# SOS – neyðútgongd vantar

**Skúlaloftið skal steingjast! Tað eru boðini, sum Hvalvíkar skúli hevur fingið frá Brunaumsjón Landsins. – Eg standi á berum, sigur Regin D. Patursson, sum er tann av lærarunum, ið nýtir loftið mest í undirvísingini**

BRUNAVIÐURSKIFTI
*Rúna Sivertsen*
*runa@kallnet.fo*



*Regin D. Patursson er tann av lærarunum, sum nýtir skúlaloftið mest í undirvísingini. - Eg standi á berum, um vit missa loftið, sigur hann*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

Á árliga fundinum fyri foreldur at børnum í Hvalvíkar skúla fríggjakvøldið boðaði skúlastýrisformaðurin frá, at skúlin hevur fingið boð um at steingja loftið til brunatrappa er gjørd.

Hetta kemur illa við, tí nógv virksemi fer fram á loftinum, bæði í og uttan fyri skúlatíð.

Foreldrini vórðu sera hørm um boðini og gjørdu av at senda kommunala myndugleikanum eina inniliga áheitan um at fáa viðurskiftini í rættlag innan næsta skúlaár.

Í stundini var eitt skriv sett saman at senda Sunda Kommunu.

## Afturstig

Í skrivinum verður millum annað sagt, at tað verður eitt stór afturstig fyri menningina av skúlanum, um skúlaloftið verður stongt.

Regin D. Patursson er tann av lærarunum, ið nýtir loftið mest í undirvísingini. Hann leggur stóran dent á fysiskar og skapandi lærugreinir, eitt nú tónleik.

– Eg standi á berum, um vit missa skúlaloftið, sigur hann.

Sólgerð Foldbo, skúlastýrisformaður, harmast um, at neyðugt skal verða at steingja loftið, tí tað kemur at ávirka nógv tær skapandi lærugreinirnar, serliga tónleikin.

Skúlin er lítil, og vit hava einki pláss at taka av.

– Tað verður í størstan mun undirvísingin hjá Regini, sum verður ávirkað av støðuni. Eisini frítíðarvirksemi, sum fer fram á loftinum, eftir skúlatíð, má halda uppat.

– Síðani Regin byrjaði, sum lærari hjá okkum, hevur hann megnað at lyft tónleikastøðið hjá næmingunum úr nærum ongum, til at vit nú hava eitt skúlaorkestur, sigur hon.

## Tónleikurin bjargingin

Hon vísir á, at í Hvalvíkar skúla eru nógvir tilfluttir næmingar. Fleiri av teimum hava búð uttanlands. Tí hevur skúlin havt serstakliga nógv brúk fyri skapandi lærugreinum, sum hava verið ein góð hjálp í at sjóða næmingarnar saman.

– Skúlin hevur eisini lutfalsliga nógvar næmingar við serligum tørvi, og er tónleikurin komin okkum til góðar.

– Tað hevur víst seg, at tónleikurin eisini hevur verið við til at ment næmingarnar, bæði bókliga og sosialt.

Í fleiri ár hevur skúlastýrið roynt at fingið kommununa at gjørt brunatrappu, men tað hevur enn ikki eydnast. Tískil hevur skúlaloftið ígjøgnum langa tíð verið óforsvarligt. Men nú hevur altso Brunaumsjón Landsins gjørt bart og krevur loftið stongt.

– Vit kunnu snøgt sagt ikki vera loftið fyri uttan, og tí mugu brunaviðurskiftini fáast í rættlag nú, sigur skúlastýrisformaðurin at enda.

# Brunatrappa skal gerast skjótast

**Heðin Zachariasen ásannar, at brunaviðurskiftini í Hvalvíkar skúla mugu fáast í rættlag. Men tað er neyðugt við einari loysn til allan bygningin. Í løtuni arbeiðir tekniska deild hjá bygdaráðnum við eini heildarloysn, sigur borgarsjórin í Sunda Kommunu**

BRUNAVIÐURSKIFTI
*Rúna Sivertsen*
*runa@kallnet.fo*

Sjálvsagt skulu brunaviðurskiftini í Hvalvíkar skúla vera í lagi, sigur Heðin Zacharisen, borgarstjóri í Sunda Kommunu.

Hann staðfestir, at viðurskiftini ikki eru forsvarlig. Leiðarin á teknisku deild hjá bygdaráðnum arbeiðir í løtuni við eini loysn til allan bygningin.

Tað er nevniliga ikki nóg mikið við eini trappu til loftið. Neyðútgongd má eisini gerast til miðhæddina í skúlabygninginum, sum er í trimum hæddum.

Hann vísir tó á, at skúlaloftið bert hevur verið nýtt í parttíðar undirvísing seinastu trý árini.

Eisini ger hann vart við, at allur bygningurin er av betongi, bæði veggir, gólv og trappur. So tað skal vilja ógvuliga illa til, um nakar álvarligur eldur kyknar upp inni í skúlanum.

Men tað er eingin undanførsla fyri kommunla myndugleikan, sigur borgarstjórin og leggur aftrat, at málið skal loysast skjótast til ber.

Málið um brunaviðurskiftini í Hvalvíkar skúla kemur fyri sum eykamál í teknisku nevnd í kvøld, mánakvøld tann 12. juni. Síðani verður tað viðgjørt í fíggjarnevndini mánakvøldið í aðru viku.

Málið skal avgreiðast áðrenn bygdaráðið fer í summarfrí seinast í hesum mánaðinum, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri.



*Málið um brunaviðurskiftini í Hvalvíkar skúla skal avgreiðast áðrenn bygdaráðið fer í summarfrí seinast í hesum mánaðinum, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri.*

*Mynd: Rúna Sivertsen*